# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heilsusamstarv við onnur lond

-Hví skal alt ljósið í landsuðri liggja? Heldur vit kring alla havsbrúnna hyggja, yrkti Jóannes bóndi fyri skjótt hundrað árum síðani. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum Hans Pauli Strøm hevur tikið eitt sera áhugavert og týdningarmikið stig til samstarv við Skotland, og tað fyrsta, ið kemur einum til hugs er: -hetta átti at havt verið gjørt fyri langari tíð síðan. Harvið hava vit eisini sagt, at vit halda hetta vera eitt sera týdningarmikið og áhugavert stig, sum landsstýrismaðurirn eigur rós fyri.

Hans Pauli Strøm hevur í Edinburgh hitt skotska heilsumálaráðharran, Nicola Sturgeon, sum var sera positiv fyri einum samstarvi við tað føroyska heilsuverkið. Skotar hava síðani 1999 haft fulla politiska umsiting av heilsuverkinum innan fyri karmarnar av skotsku sjálvstýrislógini. Samanborið við England, hevur Skotland ført ein rættuliga øðrvísi og nógv betri heilsupolitik. Landsstýrismaðurin vitjaði eisini í Aberdeen, har meginsjúkrahúsið veitir tænastu til Hetland, Orknoyggjar og Suðuroyggjar og hartil hevur eina sera framkomna telemedisinska tænastu. Kannað verður nú, um føroyingar kundu haft fyrimun av einum skipaðum samstarvi við hetta meginsjúkrahúsið. Flogtíðin til Aberdeen er einans helvtina av tíðini at flúgva til Danmarkar, og kann hetta í ávísum førum verða avgerandi fyri akuttari læknahjálp.

Tað er als eingin ivi um, at á heilsuútbúgvingarøkinum kundu Føroyar eisini haft fyrimunir av einum tøttum samstarvi við Skotland. Hetta er galdandi fyri grundútbúgvingar, víðari útbúgvingar umframt eftirútbúgvingar. Nógv fólk aðrastaðni frá ynskja at lesa á teimum hægru lærustovnunum í Skotlandi, og landið útbúgvir fleiri heilsustarvsfólk, enn tey sjálv hava tørv á. Hetta vildi verið í samsvari við tann útbúgvingarpolitikk, sum skiftandi landsstýri hava rikið. Tað er eingin ivi um, at eitt fjølbroyttari úrval av heilsutænastum vildi gagnað sjúklingunum. Hetta má og skal vera yvirskipaða málið við heilsuverkinum. Latið okkum fáa avtalur við Skotland og Ísland, sum eru okkara næstu grannar, hvørs heilsuverk eru millum heimsins fremstu.

Føroyar hava brúk fyri at venda eyguni eisini móti okkara næstu grannalondum. Vit hava havt frálíkt samstarv við Danmark, men vit hava sum øll onnur samfeløg eisini brúk fyri at hava fleiri bein at standa á í samstarvinum úteftir. Tíðin er komin til at hyggja til Skotlands, Onglands, Noregs og Ísland eisini. Og hví ikki eisini til Írland! Nú vit skulu á val tvær ferðir átti samstarv við onnur lond nettupp verið týðandi partur av valskránni. Samstarv við skotska heilsuverkið er ein góð byrjan.

**Sosialurin**

## Hagtøl, ið mugu broytast



Val

**HELENA DAM Á NEYSTABØ**
Valevni til fólkatingsvalið
Javnaðarflokkurin

Hagtølini siga, at nógvar kvinnur eins og nógv vælútbúgvin fólk trívast ikki í Føroyum. Orsøkirnar eru mangar. Tað snýr seg bæði um vantandi vælferðartænastur - hjá til dømis einligum mammum, og førleikaskerdum. Men tað snýr seg ikki minst um vantandi arbeiðs- og menningarmøguleikar hjá fólki við serligum førleikum.

Samfelagið hevur stóran tørv á kvinnunum. Longu nú eru uml. 2000 færri kvinnur enn menn. Hugsið um avleiðingarnar, um gongdin heldur fram. Hagtølini siga nevniliga, at tað eru kvinnur í aldrinum millum 20 og 39 ár, sum velja Føroyar frá.

Vit hava so sanniliga eisini brúk fyri teimum væl lærdu. Vinnulívið, heilsuverkið útbúgvingarskipanin og ikki minst mentunarlívið - øll rópa eftir væl útbúnum fólki, kreativum fólki og fólki við fjølbroyttum royndum. Fólki, ið kunnu opna dyr.

Hetta er ein katastrofal gongd, sum sigur okkum, at vit mugu styrkja samhaldsfestið og tora at taka lut í alheimgerðini.

Sum umboð fyri Javnaðarflokkin og fyri Føroyar í Fólkatinginum fari eg at brúka alla mína orku til at gera nakað við hetta vandamál. Tað má kannast út í æsir, hví gongdin er sum hon er, hví hesi fólkini rýma, ella hví tey ongantíð koma heim aftur. Ítøkilig tiltøk mugu orðast og ikki minst fremjast fyri at venda gongdini.

Tað er stór skomm fyri Føroyar, bara at lata standa til. Tað má ikki vera snævurskygni og ósolidariskar skipanir, ið gera, at føroyskar kvinnur og vælútbúgvið fólk velja ikki at búseta seg í Føroyum.

## Tjóðveldi á Fólkatingi



Val

**JÁKUP PETERSEN**
Valevni til fólkatingsvalið
Tjóðveldi

Tjóðveldi fer á Fólkating fyri at arbeiða og fáa úrslit. At verða røddin sum flytir fram føroysku áhugamálini á ein virðiligan og ábyrgdarfullan hátt. Sum skapar áhuga og virðing fyri føroyingum og tí føroysku tjóðini.

Hetta er tann óhefta røddin sum ikki rennur frá ábyrgdini. Fólk kunnu verða heilt trygg í, at tað ikki verður vikið frá kósini, og at allar kanningar, samarbeiði, semjur og átøk verða gjørdar í opinleika við tí endamáli, at styrkja tjóðina og førka hana alt nærri fullveldinum.

Sum nógv tann ýdnasti fólkatingslimurin fyri Føroyar í nýggjari tíð, hevur okkara umboð av álvara flytt mørk, eisini saman við øðrum so, at tað gerðst alt rúmligari bæði her heima og úti, at arbeiða fram móti frælsum Føroyum.

Við einum miðvísum og virknum tjóðveldis umboði á Fólkatingi tryggja vit, at eitt vakið og virkið umboð. sum brennir fyri føroyskum áhugamálum, áhaldandi kann veita Føroyum og føroyingum bæði her heima og úti varandi tryggd og menning.

Tí er tað umráðandi, at velja Tjóðveldi tann 13. novembur.

## Vaskikonan fíggjar Norðuratlantsbólkin!



Val

**ANNFINN BREKKSTEIN**
valevni sambandsflokksins
www.brekkstein.com

Føroysku veljararnir hava seinastu tíðina verið vitni til, hvussu Tjóðveldi roynir at vinna sær ávirkan ígjøgnum Norðuratlantsbólkin. M.a. hevur Norðuratlantsbólkurin lagt úrslit fram um eina kanning av viðurskiftunum hjá føroyingum í Danmark.

Men tað sum Tjóðveldi ikki avdúkar, er, at tað eru donsku vaskikonurnar – fyri at nýta floksins egnu orð – sum fíggja arbeiðið hjá bólkinum.

Veruleikin er, at Norðuratlantsbólkurin hevur fingið undantak frá formansskapinum í fólkatinginum, at virka sum bólkur. Eftir donskum lógum, skulu minst 4 umboð manna ein bólk, fyri at fáa fíggjarligan styrk til sítt virksemi. Øll vita, at Norðuratlantsbólkurin verður mannaður av tveimum grønlendskum og einum føroyskum fólkatingslimi. Høgni Hoydal, sum er føroyska umboðið, hevur ongar “skruplir” av, at donsku vaskikonurnar stuðla Norðuratlantsbólkinum við 100.000 kr., um mánaðin. Tað er stuðulin sum fólkatingið gevur bólkinum til sítt arbeiði. Men sami Høgni Hoydal heldur tað vera vanvirðing, tá ríkiskassin letur føroyska samfelagnum 660 miljónir kr., um árið. Hvar er logikkurin? Hvat halda føroyingar sum búgva í Danmark um, at teir verða nýttir sum kastibløka í valstríðnum hjá Tjóðveldi?

Føroyingar sum hava valt at búgva í Danmark, gera tað av egnum huga, og tí teir trívast har.

Tað kunnu vit bara takka ríkisfelagskapinum fyri. Vit sum velja at stuðla ríkisfelagskapinum, fara altíð at virka fyri, at føroyingar kunnu búleikast í Danmark, á jøvnum føti við danir og grønlendingar, sum eisini eru partur av ríkinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.